Saknaði mammuna:

# Hjálpti at síggja listan

**Mikkel Rosenquist, sum býr í Klaksvík, heldur at listin yvir saknaðar persónar átti at verið almannkunngjørdur nógv fyrr. Sjálvur visti hann onki um mammu sína, sum møguliga var í vanlukkuøkinum, fyrr enn í morgun**

VANLUKKAN

*Anna V. Ellingsgaard*
*anna@sosialurin.fo*

31 ára gamli Mikkel Rosenquist, sum starvast Í Klaksvíkar Timburhandli, undrast yvir, at danskir myndulеikar hava bíðað so leingi við at almannakunngera listan yvir saknaðar danir í vanlukkuøkinum. Sjálvur royndi hann fleiri ferðir til fánýtis at venda sær til danska uttanríkismálaráðið fyri at frætta okkurt um mammu sína. Mamman starvast á donsku sendistovuni í Bangladesh, men skuldi eftir ætlan halda jólafrí longri suðuri í India.



*– Eg bleiv sjálvandi glaður, tá eg sá, at mamma ikki stóð á listanum, men eg skilji ikki, hví listin ikki varð almannakunngjørdur fyrr, sigur Mikkel Rosenquist, sum starvast í Klakvíkar Timburhandli*

### Frið í sálina

– Eftir at hava roynt fleir ferðir, eydnaðist tað mær umsíðir at fáa fatur á danska uttanríkimálaráðnum hósdagin, har eg fekk at vita, at mamma ikki stóð á listanum. Tað var eg sjálvandi glaður um, men tað undrar meg stórliga, at ein slíkur stovnur ikki hevur eina kreppulinju í slíkum førum, sigur Mikkel Rosenkvst, sum eins og øll onnur bara fekk fatur á einum skrivstovufólki, sum royndi at stilla hann um til rætta viðkomandi.

Eitt sindur meir frið í sálina fekk Mikkel, tá hann 2. januar sá almenna listan, og í morgun fekk hann so umsíður ein teldupost frá mammu síni, sum var komin aftur til Bangladesh í øllum.

### Skeivt navn kann fyrigevast

Mikkel er sannførdur um, at tað var ein røtt avgerð at almannakunngera listan yvir saknaðar persónar, men skilur ikki, hví myndugleikarnar ikki gjørdu tað fyrr.

– Teir hava eftir øllum at døma verið ógvuliga bangnir fyri, at nøvn vístu seg at vera skeiv - at onkrir persónar also ikki vóru saknaðir kortini. Men eitt slíkt mistak hevið eg í øllum førum fyrigivið teimum. Hevið tað verið øvut, hevði tað nokk verið truplari at góðtaka, sigur Mikkel, sum eisini hevur verið nógv í iva um, hvørt hann skuldi meldað mammuna saknaða ella ikki.

– Eg eri hennara nærmasti avvarandi, so tað var upplagt, at eg skuldi gera tað, um tað skuldi gerast. Men nær tekur man eina slíka avgerð? Mamma arbeiðir hjá danska uttanríkismálaráðnum, og tí áttu tey at verið tey fyrstu at boða frá, hvussu veit við hjá teirra starvsfólkum, men har var sum sagt óvanligt trupult at fáa nøkur greið boð. Og tað tykist løgi, tí hetta er jú ein stovnur, sum júst nú hevur ein sera týdningarmiklan leiklut, nú hundratals danir hava roynt at komið heim úr umráðnum, sum skjótast, sigur Mikkel og leggur afturat, at svenska uttanríkisráðið visti til dømis benanvegin, at umleið 5000 svenskar fartelefonir vóru í økinum, tá vanlukkan hendi.

– Tey sendu í stundini sms-boð send á hvørja einastu telefon, bara fyri at vita, hvussu visti við hjá fólki. Tað var ein innsatsur, sum munaði nakað eftir bert lítlari løtu, so tey avvarandi fingu frið í sálina. Meir skal í veruleikanum ikki til, tí í eini slíkari støðu er óvissan tað ringasta, sigur Mikkel Rosenquist.

Danska løgreglan:

# Rætt at kunngera nøvnini

**Tað gjørdi mun at biðja fólk gera vart við seg. Bert fáar tímar eftir at danska ríkisløgreglan hevði almannkungjørt listan yvir saknaðar danir í vanlukkuøkinum, var talið minkað úr 268 niður í 92**

VANLUKKUØKIÐ

*Anna V. Ellingsgaard*
*anna@sosialurin.fo*

Dapri listin yvir saknaðar danir, sum danska ríkisløgreglan legði út á internetið kl. 10 fyrrapartin 2. januar, hevði hóast alt eina røð av sólskinsøgum við sær. Listin elvdi til telefonstorm hjá løgregluni, har fólk sjálvi ella avvarandi ringdu og gjørdu vart við, at persónar, ið stóðu á listanum, vóru komin aftur í aftur í øllum góðum. Sama kvøld kundi løgreglan almannkunngera ein nýggjan lista, har 177 nøvn vóru tikin burtur.

### Ikki ov dramatiskt

Danska ríkisløgreglan fegnast um útslitið, men viðgongur, at tað var ein trupul avgerð at taka, tá listin yvir saknaðar danir í vanlukkuøkinum í Asia var almannakunngjørdur. Røddir hava eisini verið frammi um, at tað var ósømiligt at 177 nøvn upprunaliga komu at standa á listanum á fólki, sum kortini høvdu tað gott. Nógvar danskar familjur hava hava fingið uppringingar frá fólki, sum vildu vísa sína samkenslu, tí onkur av teirra avvarandi hava staðið á listanum.

– Summi hava verið ørg um at vit hava yvirdramatiserað støðuna. Men støðan er dramatisk. Úrslitið vit nú hava fingið, høvdu vit annars møguliga skula bíðað eftir í dagar, kanska vikur, sigur ríkisløgreglan sambært Berlingske Tidende.

## 100.000 kr. frá Skótahjálpini

**Neyðhjálpargrunnurin hjá Skótahjálpini hevur gjørt av at lata 100.000 kr. til innsavningina hjá Reyða Krossi**

NEYÐHJÁLP

*Tíðindaskriv*

Hjá flestu skótaliðum kring landið byrjar arbeiðsárið fyrst í september við at tiltakið, nevnt "Skótahjálpin" er á skránni í viku 39. Tá ganga skótar hús úr húsi og bjóða sær til at gera eitthvørt fyri fólk, sum teir so fáa nakrar krónur afturfyri. Eitt nú fara tey mangan okkurt ørindi, vaska bil, sópa tún, ansa børnum, taka upp epli ella hvat tað nú kann vera.

Við Skótahjálpini fáa vanliga frísk og ferðug børn í Føroyum høvi at hjálpa børnum, sum vegna sjúku, fátakt, vanlukku, kríggj ella á annan hátt hava hjálp fyri neyðini. Hetta verður gjørt á tann hátt, at ein partur av árligu Skótahjálpini verður nýttur til eina verkætlan í Føroyum og ein partur til eina verkætlan uttanlanda, vanliga í einum menningarlandi, børnum at frama. Seinasti triðingurin fer í ein grunn, sum er ætlaður til hjálp í samband við vanlukkur.

Úr hesum grunni er sjálvsagt at hjálpa, nú so illa er statt í londunum kring Indiskahavið. Nevndin fyri Skótahjálpina, sum hevur umboð úr øllum teimum 4 skótasamskipanunum í Føroyum, er samd um, at í føri sum hesum er munabest at hjálpa gjøgnum Reyðakross í Føroyum. Tí stuðlar Neyðhjálpargrunnurin hjá Skótahjálpini tiltakið hjá Reyðakrossi við 100.000 krónum.

Harumframt fer skótahjálpin at samskipa innsavningartiltak í næstum til vanlukkuhjálpina hjá Reyðakrossi. Við tað, at skótar ikki eru í øllum landinum, er hesaferð ætlanin, at skúlabørn fara at ganga í húsini við bússum. Nú er brúk fyri einum skjótum og munagóðum tiltaki. Tí verður eisini roknað við hjálp frá peningastovnum, tíðindatænastu og møguliga eisini frá øðrum felagsskapum.